# FRAMSÝNING 2007

**Tórshavnar Kvøld– og Ungdómsskúli**
**Tórshavnar Listaskúli**
**hava framsýning í**
**EYSTURSKÚLANUM**

**Leygardagin 31. mars kl. 14.00 – 19.00**
**Sunnudagin 1. apríl kl. 14.00 – 19.00**

**Eisini verður tónleikur og kórsangur**

**EYSTURSKÚLIN**

**Leygardagin:**

Kl. 14.00 Heðin Mortensen, borgarstjóri, setir framsýningina.
Kl. 14.15 Barnakórið Dropar — Lærari: Sigrið Sivertsen
Kl. 15.00 Havnar Hornorkestur — Lærari: Ove Olsen
Kl. 16.00 Harmonikkuspæl — Lærari: Niels Olsen

**Sunnudagin:**

Kl. 15.00 Havnarkórið — Lærari: Ólavur Hátún
Kl. 16.00 Harmonikkuspæl — Lærari: Niels Olsen

**Høvi verður at keypa kaffi og køkur**
**(Eisini verður tombola)**

**Tórshavnar Kvøld– og Ungdómsskúli**
**Tórshavnar Listaskúli**

KV2007

Starvslýsing

Heimatænastan

## Terapeutar til Heimatænastuna Vágar / Norðstreymoy

Í samband við at økisterapi verður sett í verk í Heimatænastuni øki 2, og at ergoterapi og fysioterapi verða settar í verk inni á Røktarheiminum á Mørkini, verður søkt eftir starvsfólki til setan 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu at røkja hesar uppgávur. Talan er um fulltíðarstørv.

- Eitt starv sum fysioterapeutur og
- Eitt starv sum ergoterapeutur

Tilboðið skal skipast og mennast í tøttum samstarvi við økisleiðsluna, aðrar starvsbólkar og samstarvsfelagar, sum hava týdning fyri einstaka brúkaran.
Arbeiðið hjá økisterapeutinum verður at veita tænastur til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika.
Tænastan verður veitt til fólk yvir 18 ár, ið búgva heima, á Eldrasambýlunum og á Røktarheiminum.
Talan er um eitt nýtt tilboð við útgangsstøði í einstaka brúkaranum, soleiðis at tað verður lagt upp til eitt heildartilboð.

Í mun til brúkaran skal økisterapeuturin:

- Meta um førleika og tørv á tiltøkum
- Veita ADL- og funktiónsvenjing
- Veita venjing/viðgerð, uppafturvenjing og viðlíkahaldsvenjing til brúkaran
- Veita vegleiðing og undirvísing til starvsfólk og avvarðandi í mun til viðlíkahaldsvenjing hjá brúkaranum
- Veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarðandi
- Gera fyrireikandi og uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi
- Taka lut í meting, útvegan og nýtslu av hjálpitólum, húsabroytingum v.m.

**Setanarviðurskifti:**
Terapeutarnir hava beinleiðis tilvísing til økisleiðaran. Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin í løtuni er Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy. Arbeiðsstaðurin er við útgangsstøði frá Røktarheiminum á Mørkini.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, á tlf. 333249/282249.

**Umsókn:**
Sendi eina umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein,
økisleiðari

**Umsóknarfreist: 20. apríl 2007**

**Les meira á heimasíðuni www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsu málaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

sansir.fo

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

Føroya Náttúrugripasavn

# Skip til hvalateljing í summar

Í summar verður hvalateljing í føroyskum sjógvi. Føroya Náttúrugripasavn samskipar føroyska partin av stóru TNASS (Trans North Atlantic Sightings Surveys) hvalateljingini í Norðurhøvum, har eisini USA, Kanada, Grønland, Ísland, Noreg, Russland og ES luttaka.

Í hesum sambandi søkja vit eftir skipi at leiga til hetta endamál í tíðarskeiðinum 28. juni til 26. juli. Skipið skal vera størri enn 35 metrar og skal kunna sigla við 10 míla ferð. Møguleiki skal vera fyri at seta eygleiðaratunnu, 1.6 m x 2.5 m, oman á brúgvatak ella niður á dekk. Meira fæst at vita um verkætlanina og hvørji krøv verða sett til skipið við at venda sær til Føroya Náttúrugripasavn, tlf. 35 23 20.

**Føroya Náttúrugripasavn**
**Fiskimálaráðið**

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin

